

Richard Danielsen

Opið brævtil

# Helenu Dam á Neystabø mentamála-ráðharra

*Nær fer Mentamálaráðið at steðga sjónvarpssendingini »Tær sjey deyðssyndirnar«?*

Góða Helena.

Nær fer mentamálaráðið at steðga sjónvarpinum í at senda slíkt, sum var sent í gjárkvøldið 11. august. Hetta er jú niðan fyri alt lámark av sendingum, ein slík fúl sending og so tær Heilagu skriftirnar spottaðar á grovasta hátt. Sendingin kallaðist »Tær sjey deyðssyndirnar« tað er ein røð, so tað kemur meir av sama slag.

Eg var á aðalfundi hjá Kristiligа Lurtara og Siggjarafelagnum í ár, og har vóru umboð fyri Kringvarpið boðin við. Tað kom eisini fram á tí fundinum, um ikki at senda ósømiligar sendingar, tey vóru fitt at snakka við og positiv, hóast ein føldi, at tað er ein viss gjógv í millum hvat summi halda vera sømiligt og ósømiligt og ein sjálvur. Men hetta í gjárkvøldið var so groft, at handan sendingin eigur at verða steðgað beinanveg. Okkara almenna Kringvarp eigur ikki at verða brúkt til slíkt.

Vit liva í einum landi, hvar vit hava talufrælsi, men tað almenna sjónvarpið eigur ikki at verða brúkt til hvat sum helst, sum nú onkur, sum kanska arbeiðir har finnur uppá at senda. Tey hava ongan rætt til at hóreiggja sær, sum teimum lystir við okkara sjónvarpi, sum vit øll gjalda fyri og tí eiga.

Og Kringvarpsstjórin, sum letur slíkt sleppa ígjøgnum eigur at skifta hugburð við tað sama og stoppa slíkum. Eg vóni, at hann er uppgávu sína vaksin, og steðgar sendingini.



Jenis av Rana
*v. Miðflokkin*

# Mangla landsstýrismenn pengar?

**Jamen**, teir hava ongar pengar at arbeiða við, soleiðis umbar ein kvinna herfyri sosialpolitikk samgongunnar. Hetta gav mær høvið at greiða henni frá, hvussu fyrilitarleyst samgongan fer við tí skattapeningi, sum hvønn dag verður kravdur inn frá fólki, og sum teir hava forrætt at umsita.

## Nevndarbroytingin í húsalánsgrunninum

Besta dømið er frá nevndarbroytingini í húsalánsgrunninum, har fíggjarmálaráðharrin frá degi til dag, júst somu dagar sum almannamálaráðharrin kunngjørdi nýggjastu álopini á pensionistarnar, skifti nevndina út. Orsøkin var, at táverandi nevndarlimir vágaðu sær av halda nakað annað enn hann. Síðani setti hann egnar floksfelagar í nevndina- og sjeyfaldaði mánaðarligu samsýning teirra.

Er tað tekin um menn, ið mangla pening?

## Dømi úr uttanríkisráðnum

Ella dømi úr uttanríkisráðnum. Somu dagar sum báðar omanfyrinevndu hendingar fara fram, bíleggur landsstýrismaðurin í uttanríkismálum sær sjálvum triðja almenna ferð til USA. Ferð, sum ein, við fyriliti fyri peningi, lættliga kundi keypt fyri kr. 30.000 fyri trý aftur og fram úr Føroyum til Washington. Men ferð hansara, goldin við skattapeningi, kostaði kr. 167.964 krónur- tvs. gott og væl 52.000 krónur fyri hvønn.

Tekin um menn, ið mangla pening?

## Metoyðsl við almennum peningi

Her er talan um metoyðsl við almennum peningi, sum í øðrum londum hevði fingið álvarsligar avleiðingar her og nú.

Ferð eftir ferð at fara út til tey somu við eykakrøvum treytar. Treytar m.a., at tú sum landsstýrisfólk kennir ábyrgd og fyrst og fremst raðfesta rætt tann pening, sum tær verður litin í hendi at umsita.

Omanfyrinevndu dømi vísa tíverri, at tað ger verandi ABC samgonga ikki.



Atli Gregersen

# Sig hvat ger tingið, tú statt ei og bín

Fiskastovnarnir við Føroyar eru niðurfiskaðir. Veiðutrystið er alt ov høgt. Veiðan er alt ov lág. Fiskurin er ov smáttfallandi. Fiskivinnan gevur undirskot. Skipini, manningarnar, virkini, flakafólkini, ja alt Føroya land manglar inntøkurnar frá fiskivinnuni.

*»Men sig hvat ger tingið tú statt ei og bín, jú teir selja (vín)«.*

Løgtingið kann við einari avgerð, sum Móses gamli *»leiða fólkið úr hungursneyð gjøgnum oyðimørkina til lovaði landið land, sum fleyt í mjólk og hunangi«*. Sagt við øðrum orðum *»Frá neyð og elendigheit til gull og grønar skógir«*.

Tá fiskimørkini vórðu flutt út á 200 fjórðingar í 1977, gjørdist tað neyðugt at broyta ta hugsanina, sum tá var góð. Frá at fiska meðan fiskur var, og áðrenn ein annar gjørdi tað, til eina nýggja hugsan, sum er at troyta og røkja okkara fiskastovnar soleiðis, at teir geva so nógv av sær sum møguligt hvørt ár.

Vit hava vitanina, hvussu vit gera hetta. Tað er at minka veiðutrýstið, og harvið við tíðini, fiska nógv meir. Álíkavæl hava vit 33 ár seinni ikki saðlað um.

Einaferð má ein løgtingsmeirluti fara at vakna. Tá man hevur forsovið seg í 33 ár, er tað pínadoy upp á hægstu tíð at taka seg saman.

Fleiri eru vaknaðir, millum aðrar Magni Laksáfoss. Teir royna at purra hinar út. Hvat hendur. Jú løgmaður kemur á sjónvarpsskíggjan og skírir sín seriøsa floksfelaga fyri at vera populist. Tað er ein, sum roynir at tekkjast veljarunum her og nú. Vorðið sum sjálvmál av løgmanni.

Kaj Leo vakna! Far so runt á samgonguskútuni og purra út. Koyr so teir, sum møguliga ikki vakna í land, ella fær til kei og fær so sjálvur í land.

Eg heiti á hvønn einstakan tinglim um taka hetta mál í tí álvara tað hevur uppiborðið. Setið tykkum væl inn í málið. Gerið so tað sum rættast er, ikki tað sum lættast er.

Jørn Nielsen

# Sig undskyld, Israel!

Efter netop at have læst 3 tidligere udenrigsministres bredside mod Israel, indser jeg, at Israel bør undskylde, at det ikke allerede lod sig kvæle ved fødslen i 1948 af indtrængende fjender.

Ja, Israel bør sige undskyld, fordi det gennem årene har forsvaret sig. Godt nok var det ikke jøderne, der begyndte den væbnede konflikt, men de burde have indset, at dets arabiske naboer var i deres gode ret til at sende byger af raketter ind over landet, dræbe og lemlæste kvinder og børn, og forstå, at når palæstinenserne jubler og danser over ethvert heldigt raketnedslag, er det kun udtryk for glæden ved en frihedskamp, som verdenssamfundet stort set bakker op om.

Derfor sig undskyld, du evige jøde, at du ikke lod dig likvidere for længst. Sig undskyld, at du ikke ydmygt accepterede den frådende beskyldning: "besættelsesmagt". Sig undskyld fordi du mente dig i din ret til at forsvare dine grænser og endda af sikkerhedsgrunde revidere disse. Forstå dog, at du dybest set ingen eksistensberettigelse har!